Vil hava illgruna avsanna›an

Jenis av Rana spyr løgmann, um hann vi› fullari trygd kann vissa løgtingi› um, at Føroyar og føroyingar ikki eru vi› í n‡ggju rakettverjuætlanini hjá USA

HERNA‹ARMÁL
Ey›un Klakstein



Jenis av Rana vil hava trygd frá løgmanni um, at føroyingar ikki eru vi› í n‡ggja rakettskjøldrinum hjá USA

Jenis av Rana hevur nú lati› løgtinginum fyrispurning um n‡ggja rakettskjøldurin hjá USA.

Fyrispurningurin er stíla›ur løgmanni, sum ver›ur spurdur, um hann vi› fullari vissu kann tryggja løgtinginum, at Føroyar og føroyingar ikki eru vi› í n‡ggju rakettverjuætlanini hjá USA.

Upprunin til fyrispurningin hjá Jenisi av Rana er ein fundur, sum var hildin fyri nor›urlendskum politikarum í amerikanska verjumálará›num, Pentagon, sí›st í oktober mána›i.

Skakandi svar

Á hesum fundi gjørdist lívligt kjak um n‡ggju rakettverjuna, sum Grønland í hvussu so er skal ver›a partur av.

Jenis av Rana spurdi embætisman í Pentagon, um Føroyar vóru vi› í ætlanini.

– Svari›, mær var givi›, var skakandi, sigur Jenis av Rana í vi›merkingunum til fyrispurningin.

Vil hava trygd

Embætisma›urin nokta›i fyri, at Føroyar vóru partur av ætlanini, men hann avsanna›i samstundis, at ta› nakrantí› hev›i veri› nøkur herstø› í Føroyum.

– Hetta er beinlei›is ósatt, vísir Jenis av Rana á.

Ta› er vi› hesum í huga, at hann spyr løgmann, um hann kann veita løgtinginum fulla vissa fyri, at føroyingar, uttan at vita ta›, longu eru partar av framtí›arætlanum hjá amerikumonnum.

Fyltu ov nógv í lastina

Fríggjadagin kanna›i løgreglan í Havn, hvussu nógv nakrir lastbilar høvdu í lastini. Ta › er envniliga ikki loyvt at hava meiri í lastini enn ta› tonsatali›, sum bilarnir eru merktir til. Men ta› kemur fyri, at ta› ver›ur fylt ov nógv í og slíkar kanningar ger løgreglan eisini av og á.

Fríggjadagin vóru fimm lastbilar kanna›ir og tveir av førarunum fáa nú bót fyri at hava fylt ov nógv í lastina. Støddin á bótini er eftir, hvussu nógv yvirvekt var í lastini.

Fri›arligt kring landi›

LØGREGLA
Ey›un Klakstein

Hóast nógvar veitslur eru í tí›ini undan jólum, og nógv fólk eru í kátum lag, hava løgreglan í Runavík og á Tvøroyri eingi mál havt at taka sær av um vikuskifti›.

Hvørgin av politistø›unum hevur tiki› nakran fyri at koyra vi› kenning, sum vandi annars kundi veri› fyri hesa ársins tí›.

– Vit hava veri› nógv úti, men vit hava ikki havt fyri ney›ini at taka nakran, ver›ur sagt av politistø›ini á Tvøroyri.

Í Eysturoynni hevur eisini veri› fri›arligt hjá politinum.

Skipaeftirliti› ver›ur føroyskt

Jørgen Niclasen hevur nú fingi› grønt ljós frá løgtinginum at fara undir samrá›ingar vi› stjórnina um at yvirtaka Skipaeftirliti› og málsøki› trygd á sjónum

YVIRTØKA
Magnus Dam

22 tingmenn atkvøddu fyri uppskotinum hjá Jørgen Niclasen um at fara undir samrá›ingar vi› donsku stjórnina um at fáa Skipaeftirliti› og øll sjóvinnumál á føroyskar hendur at umsita. 5 tingmenn, allir úr Sambandsflokkinum, atkvøddu ímóti uppskotinum.

Máli› skal nú endaliga samtykkjast vi› tri›ju vi›ger› í løgtinginum, á›renn landsst‡risma›urin í fiskivinnumálum kann byrja samrá›ingarnar vi› stjórnina hjá Nyrup. Landsst‡risma›urin ætlar at fara undir samrá›ingarnar skjótast gjørligt.

Sambært uppskotinum hjá Jørgen Niclasen fer ta› at kosta føroyingum umlei› 18 milliónir krónur um ári› at umsita málsøki›. Vi › málsøkinum fylgir umsitingin av øllum sjóvinnumálum, vitunum í Føroyum, ve›urtænastuni og farvatnsuppmerkingini.

Seta spurnartekin vi › kostna›in

Men andstø›utingmenn seta spurnartekin vi› metta kostna›in hjá Jørgeni Niclasen.

Hóast teir atkvøddu fyri uppskotinum, so halda Henrik Old og Dan R. Petersen úr Javna›arflokkinum, at Jørgen Niclasen hevur undirmett, hvussu nógva fíggjarliga og fyrisitingarliga orku ta› krevur at yvirtaka og umsita málsøki›. Teir vísa á, at vitatænastan, uppmerkingin og ve›urtænastan ver›a mett at kosta umlei› 8 milliónir krónur. Men hetta er bara ein lítil partur av øllum málsøkinum, og tá er hædd ikki tikin fyri, hvussu nógv ta› kostar at vi›líkahalda vitarnar og keypa tænastur frá útlendskum ve›urstø›um.

Tingmenninir halda eisini, at ta› fer at krevja eina nógv størri umsiting enn mett at yvirtaka málsøki›. Føroyar skulu sjálvar hava um hendi alt samskifti vi› altjó›a sjóvinnustovnin IMO, um málsøki› ver›ur yvirtiki›, og í tí sambandinum er talan um rættiliga umfatandi uppgávur. Henrik Old og Dan R. Petersen halda, at Jørgen Niclasen hevur gjørt so stutt av sum møguligt, fyri at fáa uppskoti› at glí›a betur ni›ur hjá tingmonnum.

– Greitt er, at hetta málsøki› er nógv størri, enn lagt er upp til í landsst‡risuppskotinum, siga teir í álitinum frá vinnunevndini.

Sambandsflokkurin ímóti

Allir tingmenninir hjá Sambandsflokkinum tóku undir vi› vi›merkingunum frá Alfred Olsen í vinnunevndini og atkvøddu ímóti uppskotinum. Alfred Olsen heldur, at ein ørgrynna av spurningum standa ósvara›ir, eitt nú vi›víkjandi fíggjarligu og fyrisitingarligu avlei›ingunum av eini møguligari yvirtøku. Alfred Olsen heldur ikki, at landsst‡risma›urin hevur l‡st máli› nóg greitt, hóast ta› er hansara ábyrgd.

– Uppskoti› er ein roynd frá landsst‡rismanninum at binda løgtingi› til eina stø›utakan, á›renn hann hevur givi› løgtinignum ney›uga grundarlagi› til at kenna avlei›ingarnar av endaligu stø›uni, seg›i Alfred Olsen í sínum vi›merkingum.

Men hóast atfinningarnar frá andstø›uni, so slapp uppskoti› snikkaleyst gjøgnum løgtingi› vi› a›ru vi›ger›, og Jørgen Niclasen kann nú gera seg til rei›ar at fara undir samrá›ingarnar vi› stjórnina.

Tá i› hesar eru lidnar, og ta› kann taka drúgva tí›, ver›ur eitt lógaruppskot um trygd á sjónum lagt fyri løgtingi›.

Stórur vøkstur í byggivinnuni

Lønargjaldingar í byggivinnuni øktust vi› einum fjór›ingi fyrstu 9 mána›irnar í ár sammett vi› í fjør

BYGGIVINNAN
Ey›un Klakstein

Stórur vøkstur er í byggivinnuni. Lønargjaldingarnar innan hesa vinnu øktust vi› heili 24 prosentum fyrstu 9 mána›irnar í ár sammett vi› sama tí›arskei› í fjør.

Hetta er á lei› sami vøkstur, sum var frá 1998 til 1999.

– Eftirspurningurin er stórur, me›an útbo›i› hevur ilt vi› at fylgja vi›, so tørvur er á bæ›i sethúsum og íbú›um, sigur Búskaparrá›i› í n‡ggju frágrei›ingini hjá sær.

– Stóri trupulleikin er helst ov lítil útstykking av grundstykkjum, men eisini tørvur á fleiri handverkarum tr‡stir prísirnar uppeftir.

Búskaparrrá›i› mælir til, at tali› av útstykkingum til grundstykki ver›ur økt, og harafturat heldur rá›i›, at almenn ella privat íbú›arbygging er ein møguleiki, sum higartil ikki hevur veri› n‡ttur í nóg stóran mun.

Almenna skuldin minkar

Almenna nettoskuldin kemur í ár væntandi ni›ur um 2 milliardir krónur

SKULD
Ey›un Klakstein

Almenna nettoskuldin er nógv minka› seinnu árini, og hon kemur væntandi ni›ur um tvær milliardir krónur í ár.

Hetta sta›festir Búskaparrá›i› í n‡ggjari frágrei›ing, sum júst er komin.

Almenna bruttoskudlin var 1. januar í ár umlei› 6,9 milliardir krónur – 5,7 mia. uttanlands og 1,2 mia. í Føroyum. Av hesum skyldа›i landskassin 5 mia. og kommunurnar 1,6 mia., me›an almennir stovnar – serliga Landsbankin og Húsalánsgrunnurin, skylda›u 300 milliónir krónur.

Almenna nettoskuldin er nógv minka› seinastu árini og var vi› árslok 1999 mett til 2,5 mia. krónur.

Nettoskuldin kemur tí væntandi ni›ur um 2 mia. í hesum árinum.

Landskassin skylda›i vi› ársbyrjar 4,3 mia. netto, kommunurnar 1,3 mia., me›an almennir stovnar áttu 3,1 mia. kr.

Løgma›ur ovfarin av Nyrup

Anfinn Kallsberg skilir ikki pástandin hjá Poul Nyrup Rasmussen um, at teir bá›ir hava avtala› at samrá›ast um n‡ggja heimast‡risskipan. Løgma›ur sta›festir einafer› enn, at a›almál landsst‡risins er fullveldi

SJÁLVST†RISÆTLANIN
John Johannessen

Brævi›, sum Poul Nyrup Rasmussen sendi løgmanni hósdagin, hevur ført til rættuliga ørkymlan í Tinganesi.

Í brævinum sigur danski forsætisrá›harrin, at løgma›ur á fundi í Reykjavík 5. november hevur skoti› upp, at landsst‡ri› og danska stjórnin skulu samrá›ast um eina n‡ggja heimast‡risskipan. Og í sama sambandi ger danski forsætisrá›harrin greitt, at hetta merkir, at bæ›i fólkarættarliga og statsrættarliga stø›a føroyinga ver›ur verandi tann sama.

Hetta kann løgma›ur als ikki gó›taka, tí sambært honum er einki samsvar millum hesa útmelding og ta›, sum hann og danski forsætisrá›harrin tosa›u um á fundinum í Reykjavík 5. november.

– Eg eri líka ovfarin av brævinum sum øll onnur. Eg veit ikki, um danski forsætisrá›harrin ætlar at fáa ø›i í grindina einafer› afturat, ella hann ætlar at seta kílar inn millum flokkarnar í Føroyum, sigur Anfinn Kallsberg

Ætlanin heldur fram

Hóast brævi› frá danska forsætisrá›harranum ger løgma›ur greitt, at landsst‡ri› framvegis arbei›ir eftir tí leistinum, sum landsst‡ri› kunna›i um á tí›indafundi 2. november. Landsst‡ri› ætlar framvegis at tøma heimast‡rislógina, avlaga blokkin og at enda at halda fólkaatkvø›u um eina føroyska grundlóg.

Hetta ger løgma›ur eisini danska forsætisrá›harranum greitt í einum skrivligum svari, sum hann eisini hevur sent fjølmi›lunum.

Í bævinum til danska forsætisrá›harran vísir løgma›ur í trimum punktum á, hvørjar ætlanirnar hjá landsst‡rinum eru.

Í fyrsta punkti ger løgma›ur greitt, at landsst‡ri› vil hava heimast‡rislógina broytta, solei›is at ta› ber til at taka yvir øll mál uttan uttanríkismál, verjumál, heimarætt og hægstarætt.

Í ø›rum punkti sigur løgma›ur, at landsst‡ri› vil hava partarnar at skriva undir eina yvirl‡sing, har teir siga seg gó›taka eitt ynski frá føroyska fólkinum um fult sjálvræ›i.

Í tri›ja punktinum sigur løgma›ur, at hann vil hava ein sáttmála um at ni›urlaga donsku heildarveitingina.

Í sambandi vi› hetta vísir løgma›ur á, at vit skulu hava eina fólkatkvø›u um fullveldi, tá øll málsøki eru yvirtikin og blokkstu›ulin er avlaga›ur.

Taka fullveldi

Løgma›ur er bangin fyri, at danski forsætisrá›harrin vi› brævinum hósdagin aftur er farin at royna at grugga máli› um føroyskt fullveldi í fjølmi›lunum. Men løgma›ur ætlar sær kortini at royna at halda fram vi› ætlanum landsst‡rissins.

Ber ta› tó ikki til at gjøgnumføra ætlanina, heldur løgma›ur, at føroyingar mugu fara at umhugsa at taka fullveli sjálvir.

Høgni Hoydal:

Nyrup provokerar

Høgni Hoydal, landsst‡risma›ur í sjálvst‡rismálum, heldur brævi› frá danska forsætisrá›harranum vera eina provokatión og ni›urger› av øllum føroyskum sjálvst‡risstrí›i

SJÁLVST†RISÆTLANIN
John Johannessen

Landsst‡risma›urin í sjálvst‡rismálum, Høgni Hoydal, er rættuliga argur inn á brævi›, sum Poul Nyrup Rasmussen hósdagin sendi løgmanni. Hann heldur beinlei›is, at brævi› er ein roynd at seta kílar ímillum samgonguflokkarnar í Føroyum.

Harafturat heldur Høgni Hoydal, at danski forsætisrá›harrin beinlei›is stu›lar føroysku andstø›uflokkunum.

– Hann tosar beinlei›is um n‡ggjar skipanir innanfyri ríkisfelagsskapin og um sjálvst‡rislóg, vísir Høgni Hoydal á.

Høgni Hoydal heldur, at fyrispurningarnir frá Jóannes Eidesgaard til bæ›i forsætisrá›harran og Ríkisumbo›i› um sjálvst‡rislógina eru li›ur í royndini at rógva inn aftur undir danskan statsrætt, har føroyingar eingi rættindi hava.

Landsst‡risma›urin í sjálvst‡rismálum heldur ongan iva vera um, at forsætisrá›harrin roynir at sleppa sær undan tí grundarlag, sum hann longu hevur vi›urkent í samrá›ingartilgongdini, tá hann sigur, at Føroyar fólkarættarliga og statsrættarliga ver›a verandi har, vit eru nú. Tí forsætisrá›harrin hevur nevniliga vi›urkent, at fullveldissamrá›ingarnar vóru á fólkarættarligum grundarlag.

Høgni Hoydal nevnir at enda møguleikan fyri, at Føroyar sjálvar bo›a ST frá, at vit taka fullveldi.

Teir tóku land 5
- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í røðini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirprís afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini. Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.

Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.



299,-

Jógvan Arge